# HVØR EIGUR ÁRSINS LESIÁTAK 2025?



FØROYAR LESA

Les meira

NÁM

ÁRSINS LESIÁTAK Á DAGSTOVNUM

Kapping

# EIGA TIT BESTA HUGSKOTIÐ?

## VINN 5.000 KRÓNUR

**FØROYAR LESA leitar eftir ársins lesiátaki á dagstovnum. Kappingin hevur til endamáls at leggja lunnar undir góðar lesivanar hjá børnum.**

## Hvat er eitt lesiátak?

Eitt lesiátak kann vera at skipa lesiløtur, at gera ein bókavarða, at seta bókasavnsvitjanir á skrá, at gera sjónleik, sang ella annað burtur úr søgum, evnisdagar um yndissøgur ella okkurt heilt annað. Bara hugflogið setur markið.

## Hvør kann luttaka?

Kappingin er skipað sum opin kapping fyri allar dagstovnar. Tey luttakandi kunnu til dømis vera ein stova, ein bólkur ella ein stovnur.

## Hvussu luttekur mann?

Hvør luttakandi bólkur skal lata inn eina frágreiðing um átakið. Frágreiðingin skal lýsa átakið við orðum, myndum og møguliga filmsbroti. Ynskiligt er, at endamálið við átakinum er greitt, og at børnini hava verið virkin í átakinum.

**Tilfarið skal sendast til foroyarlesa@nam.fo**

## Freist

Freistin at lata inn frágreiðing og myndir, sum lýsa átakið, er 1. apríl 2025. Vinnarin verður kosin 1. mai.

**Les meira á føroyarlesa.fo**

Í dómsnevndin eru námsfrøðingur, bókavørður, lesivegleiðari og umboð fyri Føroyar lesa.
Øll innkomin hugskot verða savnað í hugskotsbanka hjá Føroyar lesa.